# VEĐRIĐ Í TÓRSHAVN



# OKTOBER 2022

# VEĐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Tórshavn - miðbýurin ........ 3
Veðrið í miðbýnum Havn ........ 4
Norðan ........ 6
Landnyrðingur norðan ........ 6
Landnyrðingur ........ 7
Landnyrðingur eystan ........ 7
Eystan ........ 7
Landsynningur eystan ........ 7
Landsynningur ........ 8
Landsynningur sunnan ........ 8
Sunnan ........ 8
Útsynningur sunnan ........ 8
Útsynningur ........ 8
Útsynningur vestan ........ 9
Vestan ........ 9
Útnyrðingur vestan ........ 9
Útnyrðingur ........ 9
Útnyrðingur norðan ........ 9
Spurningar og svar ........ **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

**Dagfesting**: 24. oktober 2022

**Staður**: Hoyvíksvegur 69 – 100 Tórshavn

**Heimildarmenn**: Magnus Pauli Norðberg Poulsen & Mortan Johannesen, sjómenn

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Tórshavn - miðbýurin

Tórshavn er størsti býur í Føroyum – bygdur á sunnasta parti á Streymoy.

Vestureftir og suðureftir eru lág fjøll, norðeftir láglendi og eystanfyri er Nólsoyarfjørður.

Sunnan fyri býin er Kirkjubøreyn (351m), vestanfyri eru Fjallið (417m) og Lítlafjall (198m); Húsareyn (345m) er norðanfyri.

Eystan fyri Nólsoyarfjørð er Nólsoy. Hon forðar briminum á eysturættum, men gevur onga verju, tá ið hugsað er um veðrið.




Mynd 1: Kort av Streymoy. Tórhavn er við bygd við sunnara enda – eystaru megin.

Eystureftir er Tórshavn ikki vard av fjøllum, tó at Nólsoy verjir ímóti brimi. Besta verjan er ímóti útnyrðingi, og yvirskipað kann veðrið í Havn tí stutt lýsast soleiðis, at tað keðiligasta veðrið er, tá ið ættirnar eru ímillum eystan og sunnan, og tað besta veðrið er, tá ið ættin er ímillum vestan og norðan.

Er ættin ímillum norðan og eystan ella ímillum sunnan og vestan, kann veðrið vera eitt bland av tí góða veðrinum í útnyrðingskvadrantinum og og tí keðiliga veðrinum í landsynningskvadrantinum.

## Veðrið í miðbýnum Havn

Veðrið í Havn er, líkasum alla aðrastaðni í Føroyum, tengt at ættini. Sveiggini ímillum gott og ringt veður eru ikki líka stór sum í øðrum støðum, men bert lítil munur í ættini kann tó gera stóran mun í veðrinum.

Er t.d liggjandi góðveður norðanfyri við lítlum ella ongum vindi av suðuri ella útsynningi og sólskini í nakrar dagar, kann tjúkkur mjørki liggja fjala Tórshavn.

Er útnyrðingur í nakrar dagar, er vanliga kalt veður norðanfyri við slavnari luft og kulda, meðan veðrið í Tórshavn er gott við klárum lofti og lítum ella ongum vindi.

Tórshavn hevur sera stóra vídd, og veðrið er ikki tað sama allastaðni. Tí mugu vit avmarka økið, vit umtala her, til miðbýin – t.e. av Vaglinum út í Hornabø og haðani niðan ímóti Heygnum Mikla og Uppi í Svanga, síðan eystureftir til Gundadal og haðani til oman á Boðanes.

Hini økini í býnum verða seinni tikin fyri seg.



*Mynd 2: Tvær tekningar av Tórshavn. Í hesum riti er tað veðrið í miðbýnum, sum er til umrøðu. Øki sæst merkt á tekningini.*

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í miðbýnum, setti undirritaði seg í samband við Magnus Paula Norðberg Poulsen (**MPNP**) og Mortan Johannesen (**MJ**). Hesir báðir hava verið sjómenn alt vaksna lívið – siglt við farmaskipi, trolara og línuskipi, umframt at hava róð út út úr Havn og fingist við aling á sjógvi í Kalbaksfirði.

Við til samrøðuna í fundarhølinum á Veðurstovu Føroya við Hoyvíksvegin hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í býnum:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 3: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan er altíð ein góð ætt í Havn.

Vindurin er javnur – ongar hvirlur. Vanliga er nógv minni vindur í Havn enn aðrastaðni í landinum á norðurætt, serliga norðanfyri.

Norðan er turr ætt í Havn. Vanliga hevur avfallið gjørt alt burtur av sær norðanfyri, áðrenn tað kemur til Havnar.

Tað er so at siga ongantíð mjørki á norði.

## Landnyrðingur norðan

Veðrið í Havn á landnyrðingi norði er tað sama sum á norði.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er góð ætt í Havn, betri enn norðan – helst tann besta ættin í Havn.

Vindurin av landnyrðingi er javnur í Havn, so javnur hann kann vera. Tað er altíð minni vindur á landnyrðingi, enn tað er sagt í forsøgn fyri landið. Ættin roynist altíð væl.

Ættin kann geva fínasta veður í Havn um summarið og hevur altíð roynst væl.

Tað kann viðhvørt snýta eitt sindur, tá ið hann hevur ligið av landnyrðingi og so farin eitt lítið sindur niðurum, niður í landnyrðing eystan. Tá kann vátakavi leggjast í Havn.

Vanliga er landnyrðingur turrur í Havn.

Eingin mjørki.

Góð greipuætt.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingur eystan er ikki nøkur ring ætt í Havn.

Á landnyrðingi eystri kemur hann undan Eystnesi.

Á landnyrðingi eystri byrjar tað at merkjast á Glyvursnesi, Argjum og ovarlaga í Vika, men ikki í gomlu Havnini.

Vindurin av landnyrðingi eystri er javnur – vanliga eitt sindur minni enn aðrastaðni í Føroyum.

Tá ið tað kemur til avfall, er landnyrðingur eystan líka sum miðal fyri restina av landinum – t.e. ikki turrari ella vátari enn aðrastaðni.

Mjørkin í Havn eru frá landnyrðingi eystri og niðureftir. Longur niður á kumpassina, verri er við mjørka. Hann blívur vekk á landsynningi suðuri ella suðuri.

## Eystan

Eystan er góð ætt av Hálsi og oman í Havnina.

Vindurin á eysturætt er so javnur, hann kann vera. Einki ber uppfyri. Vindferðin er sum miðal fyri restina av landinum.

Úr eystri niður í sunnan segðist at vera hungursætt í Havn. Ikki tí, at fiskur ikki fekst á eysturættunum (vanliga besta fiskiætt), men bátarnir sluppu ikki út.

Eystan er ein slavin ætt í Havn og eisini mjørkaætt.

## Landsynningur eystan

Veðrið í Havn á landsynningi eysti er tað sama sum á eystri.

## Landsynningur

Landsynningur er ikki ein góð ætt í Havn. Yvirhøvur er hon deprimerandi, fólk gerast í ringum lag, og effektiviteturin fer niður.

Tá ið tað er landsynningur, er vindurin javnur og ikki meiri, enn fyri alt landið.

Landsynning er ein vát ætt í Havn og eisini mjørkaætt.

Landsynningur er brimætt. Í dag verjir molin fyri briminum, men áðrenn hann varð gjørdur, kundi brotini koma niðan um Sjómansheimið.

## Landsynningur sunnan

Veðrið í Havn á landsynningi suðuri líkist tí, sum er á landsynningi.

Tó er meiri uppgangur enn á landsynningi, serliga Yviri við Strond. Nólsoy lívir ikki nóg væl fyri.

## Sunnan

Sunnan er ein miðalgóð ætt í Havn. Ikki ein vanlig ætt og kann vera ein sera óinteressant. Tað er stórur munur í veðrinum, um ættin er kring eitt hátrýst ella kring eitt lágtrýst.

Tá ið hann liggur av suðuri bert eina løtu, meðan lágtrýstini flyta seg í landnyrðing, ella hann støkkur vesturum, kann vindurin vera ójavnur. Er liggjandi suðurætt, er vindurin javnur og sama vindferð sum fyri landið.

Suðurættin er ein vát ætt í Havn og mjørkaætt eisini, tó ikki so nógv sum á landsynningi ella eystri. Pollamjørki kann liggja eina løtu, men hann hvørvur, tá ið sólin kemur fram.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er ein góð ætt, tá ið tað kemur til vind.

Á útsynningi suðuri er javnur vindur. Vindferðin tann sama, sum søgd er fyri landið.

Ættin er ikki altíð vát í Havn. Kann vera ælaveður, og tað kann regna illa í stutta tíð.

Á útsynningi suðuri er ikki mjørki í Havn.

## Útsynningur

Útsynningur er ein yvir miðal góð ætt í Havn. Ættin er tann ættin í Havn, sum líkist mest almennu forsagnunum fyri veðrið.

Vindurin er javnur og tann sami, sum er í miðal fyri landið.

Á útsynningi kemur avfallið mest í ælingum.

Tá ið tað kemur til mjørka, so er útsynningur ikki mjørkaætt í Havn, men kondensatiónsstøðið lækkar eitt sindur og fjalir t.d. Oyggjarvegin.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan er ring ætt í nógvum vindi. Annars er ættin góð.

Tá ið hann liggur av útsynningi vestri, kemur hann um Reynsmúlan og oman ígjøgnum Havnardal. Tá ið jólaódnin var í desember 1988, vóru nógvir skaðar á Norðasta Horni á hesari ættini.

Vindurin á útsynningi vestri er ójavnur, serliga tá ið tað er nakað av vindi. Tá er vindferðin eisini meiri, enn sagt er fyri landið. Er lítið av vindi, er hann javnur, tað sama sum sagt er fyri landið.

Hendan ættin er ikki vát, men er sum veðurlagið. Vanliga hevur hann gjørt burtur av sær, áðrenn hann gongur upp í útsynning vestan.

Útsynningur vestan er ikki mjørkaætt.

## Vestan

Vestan er ein miðalgóð ætt í Havn.

Á vestri er vindurin javnur. Tá ið veðrið er gott, er minni vindur enn miðal fyri landið. Í nógvum vindi kann vera meiri vindur enn sagt.

Vesturættin er vanliga ikki vát ætt í Havn ella mjørkaætt.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið í Havn á útnyrðingi vestri líkist tí, sum er á útnyrðingi.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er ein góð ætt í Havn. Tá ið hann er farin upp um vestan, er friður í Havnini, men enn kann vera vindur á Argjum.

Á útnyrðingi er vindurin javnur, fyri ikki at siga friðarligur. Tað merkist lítið til vindin.

Ættin er ikki vát, men kann vera kavaætt. Ættin er heldur ikki mjørkaætt.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið í Havn á útnyrðingi norðuri líkist tí, sum er á útnyrðingi og útnyrðingi vestri.